## DAGSINS MEINING

# Lítið men stóran týdning

Nú almenna tjakið rúmar stórmál sum framtíðarstøðu Føroya, stjørnukrígsætlanir, veðurlagsbroytingar osfr., man slíkt sum nyttan og brúk av endurskini helst ikki verða tað, sum kemur okkum til hugs í fyrstu atløgu. Men hóast lítið í vavi so hevur nettupp hesin luturin ótrúliga stórt virði. Tá hugsað verður um einstaka mannalívið.

Sjónvarpið hevði eftir okkara tykki eina rættiliga sigandi og positiva søgu í Degi og Viku týskvøldið. Ein søga, sum ikki eigur at fara aftur um, uttan at hon hevur givið okkum øllum nakað at hugsa um.

Søgan snúði seg um nakað so einfalt sum at brúka endurskin. Hon snúði seg um stóra vandan hjá gongufólki í ferðsluni hesa myrku ársins tíð. Hon snúði seg um, hvussu einstaklingar, sum hava sítt arbeiði í ferðsluni, kunnu vera við til at betra um ferðslumentanina og í síðsta enda at bjarga mannalívum.

Eini hjún í Eysturoynni, sum bæði eru bussførarar og harvið kenna teir mongu vandar, ið alla tíðina lúra í ferðsluni, hava av sínum eintingum átikið sær av útvega endurskin og lata teimum bussferðandi tey. Út frá royndum sínum sum bussførarar vita tey, hvussu ómetaliga stóran týdning eitt so lítið ting sum endurskin kann hava fyri nakað so stórt sum eitt mannalív. Er myrkt í veðrinum, regnar og eru fólk til gongu og í svørtum klæðum, ja so eru hesi at meta sum potentiell ferðsluoffur. Hvussu nógvir bilførarar tað verið seg í arbeiði ella í privatkoyring hava ikki einaferð ella fleiri ferðir verið líka við at koyra eitt av hesum "svørtu" fólkunum yvir!

Ráðið fyri Ferðslutrygd hevur oftani skipað fyri tiltøkum til frama fyri nýtslu av endurskini. Men tað er ikki lætt at venja fólk til at brúka endurskin, tá tey ikki eru von við tað. Í veruleikanum er brúk fyri eini ella aðrari hugburðsbroyting, har fólk veruliga geva sær far um teir vandar, sum alla tíðina lúra í ferðsluni. Hava vit sum foreldur t. d. ikki skyldu til at hugsa um okkara børn eins og okkum sjálvi! Tað er einki minni enn ein mirakkul, at so "fáar" veruligar vanlukkur hava staðist av, at fólk ikki brúka endurskin.

Frálíka tiltakið hjá bussførarahjúnunum í Eysturoynni átti at fingið onnur at rakna við. Ja tað átti at fingið Ráðið fyri Ferðslutrygd at tikið hetta upp og givið tí 1. prioritet. Nú tá tú ikki kann tvinga fólk til at brúka endurskin átti man at umhugsað aðrar alternativar loysnir sum hana í Eysturoynni.

Til hjúnini í Eysturoynni kunnu vit bert siga: -Gott í tykkum. Haldið fram og fáið tykkara kollegar aðrastaðni í landinum at gera sum tit. Til Ferðslutrygd: -Útvegið fleiri endurskin og latið tey verða tøk á almennum plássum sum eitt nú í bussunum. Og til SvF: -Slíkar sólskinssøgur fløva í øllum tí annars negativa tíðindameldrinum, sum tíanverri eisini er ein partur av gerandisdegnum.

**Sosialurin**

## NØVN Í VIKUNI

### Petur Waagstein farin

20. januar frættu vit deyðsboðini av Peter Waagstein, yvirlækna, sum gjørdist 88 ára gamal. Hann varð føddur 7. desember 1912. Foreldur hansara vóru Sanna, f. Dahl úr Vági og Jógvan Waagstein, lærarin úr Klaksvík, megnar tónaskaldið – og organistur við Havnar Kirkju í eitt mannaminni.

Peter Waagstein tók læknaprógv í Keypmannahavn og virkaði síðan sum lækni undir krígnum og var á Maribo Sjúkrahúsi, tá hann í 1948 tók við starvi sum einsamallur lækni í Ilulisana, í tí víða læknadøminum norðuri í ísinum í Jakobshavn. Hann hevði bundið seg at vera har í eitt ár, men tey blivu 9. Har vóru tey øll árini eftirhondini vóru børnini fimm, tá hann tók við starvinum sum yvirlækni á Klaksvíkar Sjúkrahúsi í 1958. Í 1978 fluttu tey aftur til Danmarkar og búði á ellisárunum í Værløse. Konan Lisbeth doyði fyri nøkrum árum síðani, og nú leygardagin verður Peter Waagstein jarðaður frá Værløse kirkju.

Í 1959 gav Peter Waagstein út bókini »Ilulisana Nokarsok«, har hann sigur frá árunum í Grønlandi og viðurskiftunum sum einsamallur lækni og lýsir væl frá um vinfólk, hann vann sær har. Tað hendi eisini teimum, at lítli sonurin varð álopin av hundunum, men tað eydnaðist at bjarga honum undan óhugnaligu hendingini, sum av og á kann vera beiski veruleikin hjá teimum, sum búleikast har norðuri í ísinum. Og í



1989 kom bókin »Klaksvig kalder«, her sigur Peter Waagstein frá barnaárunum í Havn, lestrarárunum í Keypmannahavn og árunum í Klaksvík, um broytingartíðina, »hvor Færøerne forvandledes fra et forsømt og afsidesliggende samfund til en moderne fiskerination med et udviklet sundhedssystem«.

Hann skrivaði eisini av og á greinar í »Ugeskrift for læger«, og fyri nøkrum árum síðani stóð grein í tíðarritinum »Ciba Symposium« við heitinum »A Doctor in the Arctic Circle«.

Ellisárini búðu hjúnini Waagstein í Værløse. Petur vitjaði heim á klettarnar av og á og trúgvur var hann móti frændum sínum alla sína tíð – og nú hann er farin er Mia Waagstein Johansen einasta, sum eftir er av systkinaflokkinum hjá gamla Waagstein.

**jl**

### Óli P 65

Í gjár fylti teknarin hjá Sosialinum, Óli Petersen 65 ár. Og tey sum eru komin so langt í hesi grein hava longu hug at smílast, tí Óli er eitt 65 ára gamalt dømi um, at so at siga alt í lívinum hevur eina stuttliga síðu, hava vit eitt opið sinni og vilja vit síggja tað stuttliga í øllum lutum. Tað er eisini nakað stuttligt við teimum mest keðiligu menniskjunum, vit kenna, teimum í okkar eygum, røttu lívsfornoktarunum og Óli er meistarin at tekna hesar skuggasíður, so tær náa okkara smílibondum.

Um vit ímynda okkum, at øll fólk í samfelagnum vóru eins, øll fóru upp um somu tíð, røktu sínar skyldur, guldu rokningarnar rættstundis, bóru seg rætt at í hvørjari einastu støðu tey komu í. Um øll høvdu somu meiningar, talaðu við eini tungu og bara vóru mynsturborgarar. Á hvat lívið hevði verið keðiligt. Var alt soleiðis, so áttu vit ongan Óla og so hevði Óli helst gingið heilt anonymur onkunstaðni innan Klakk í Klaksvík, har hann var borin í heim í 1936, tá heimurin var ein heilt annar enn i dag, tó menniskjan er



tann sama.

Óli hevur næstan profetisk evnir og hann sær nógv meira enn vit onnur, ella hann sær ørvísi enn vit onnur. Hann sær tað stuttliga, er satirikari um ein háls, og er ein meistari at síggja avleiðingarnar av tí sum hendir í samfelagnum, ikki bara í reinum bakklókskapi, tí hann hevur profetisk evnir.

Krevja vit av teknaranum, at hann skal vera óheftur, so køva vit hann beinanvegin. Og hvat er sannleikin, hetta er ein av teimum heilt stóru filosofisku spurningunum. Kendi heimsspekingurin Imanuel Kant, sáli, hevur eitt boð. Hann sigur: "Tú kann ikki skilja sannleikan sum hann er, tú kann bara skilja hann soleiðis sum hann vísir seg fyri tær sjálvum."

Tillukku við degnum og má tað komandi árini eydnast tær at ganda nógvar spannir av krunkasvørtum tusjblekki um til svalandi og forfrískandi smíl í okkara gerandisdegi, sum akkurát nú er fyltur av irriterandi dýggjvátari gráari eysturætt.

**Jústinus**


**Sosialurin**

**Sosialurin**
Stovnaður: 1927
**Ábyrgdarblaðstjóri:**
Jan Müller jan@sosialurin.fo
**Blaðstjóri:**
Eirikur Lindenskov eirikur@sosialurin.fo
**Tíðindaleiðari:**
Jústinus Eidesgaard justinus@sosialurin.fo

**Marknaðardeild:** lysing@sosialurin.fo
Jonhard Hammer jonhard@sosialurin.fo
Marjun Dalsgaard marjun@sosialurin.fo
Gudny Langgaard gudny@sosialurin.fo

**Blaðfólk:**
Áki Bertholdsen aki@sosialurin.fo
Eyðun Klakstein eydun@sosialurin.fo

John Johannessen john@sosialurin.fo
Edvard Joensen edvard@sosialurin.fo
Turið Kjølbro turid@sosialurin.fo
Stefan í Skorini stefan@sosialurin.fo
**Mentan:**
Birgir Kruse birgir@sosialurin.fo
**Ítróttur:**
Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo
**Myndamenn:**
Jens Kristian Vang jensk@sosialurin.fo
Álvur Haraldsen alvur@sosialurin.fo

**Útgevari/uppseting:**
Sp/f Sosialurin
Prent: Prentmiðstøðin

**Avgreiðsla:**
Mán.-frí. 8-16
Argjavegur 26,
Tel. 311820, Fax 314720
**Postadressa:**
Postboks 76, 110 Tórshavn
**E-mail:**
post@sosialurin.fo
lysing@sosialurin.fo
lysingartorg@sosialurin.fo

Blaðið verður prentað mánadag-fríggjadag klokkan 14[00]

**Lýsingar**

| **Freistir:** | Tekstlýsingar | Størri lýsingar | Lýsingartorgið | Heilsanir |
|---|---|---|---|---|
| Týsdagsblaðið | Mán.kl. 10 | Frí. kl. 15 | Frí. kl. 12 | Frí. kl. 12 |
| Mikudagsblaðið | Týs. kl. 10 | Mán. kl. 15 | Mán. kl. 12 | Mán. kl. 12 |
| Hósdagsblaðið | Mik. kl. 10 | Týs. kl. 15 | Týs. kl. 12 | Týs. kl. 12 |
| Fríggjadagsblaðið | Hós. kl. 10 | Mik. kl. 15 | Mik. kl. 12 | Mik. kl. 12 |
| Leygardagsblaðið | Frí. kl. 10 | Hós. kl. 15 | Hós. kl. 12 | Hós. kl. 12 |

Størri lýsingar, sum nógv arbeiði stendst av, mugu vera inni í góðari tíð og áðrenn ásettu freistir.
Framíhjápláss má umbiðjast í góðari tíð.

**Stødd:**
Ein heil síða í Sosialinum er 254mm breið og 346mm í hædd. Breiddin á einum teigi er 39mm og rúmið millum teigarnar er 4mm.




# Fólkaatkvøða í leysum lofti

**Løgmaður ásannar, at landsstýrið má koma í tingið við einum uppskoti til fólkaatkvøðuna um sjálvstýrisleistin innan ein mánað. Men samstundis viðurkennir hann, at landsstýrið ikki hevur nakað uppskot klárt og at viðgerðin dregur út**

FÓLKAATKVØÐAN
*o n o ann ss n*

Finnbogi Ísakson, løgtingsformaður, segði við Sjónvarpið týsdagin, at eitt lógaruppskot um fólkaatkvøðuna helst skal koma fyri løgtingið í næstu viku, um ætlanin er at halda hana í apríl.

Løgtingsformaðurin heldur nevniliga, eins og formenninir fyri andstøðuflokkarnir hava ført fram, at Føroya fólk má fáa minst tríggjar mánaðir til at fyrireika seg til eina so týðandi fólkaatkvøðu.

Løgmaður ætlar framvegis at halda fólkaatkvøðuna í apríl, men hann torir ikki at lova, at nakað uppskot kemur fyri løgtingið í næstu viku. Heldur ikki torir hann at geva nakað boð uppá, nær eitt slíkt uppskot kemur fyri tingið. Orsøkin er, at landsstýrið rætt og slætt ikki er liðugt at fyrireika sjálvstýrisleistin.

### Ósemja møgulig orsøk

Sjónvarpið gitti í tíðindasendingini týskvøldið, at orsøkin til, at einki nágreiniligt enn fyriliggur í sjálvstýrismálinum er ósemja í samgonguni.

Hesi tíðindi kann løgmaður hvørki avsanna ella váttað.

– Vit viðgera framvegis hetta málið í Tinganesi, og fyrr enn vit eru lidnir við viðgerðina, kann eg ikki staðfesta um vit eru samdir ella ósamdir. Viðgerðin, sum nú er í gongd vil avdúka, um vit eru samd ella ósamd, ella um vit finna fram til eina semju ella vit ikki gera tað. Hetta er ómøguligt hjá mær at svara uppá í dag, sigur løgmaður.

### Torskilt mál

Løgmaður sigur seg skilja, at føroyingar kenna seg ørkymlaðar, tá landsstýrið meldar út, at fólkaatkvøða skal vera í apríl Men at landsstýrið samstundis ikki hevur nakað meira ítøkiligt at leggja fyri fólkið, enn tíðindaskrivið frá ørðum november 2000. Hetta var tíðindaskrivið, sum avdúkaði nýggja sjálvstýrisætlanina í stuttum.

– Fólk eru altíð ørkymlað, tá tey ikki fáa at vita nágreiniliga, hvat hendir. Men tað er nú einaferð soleiðis, at hetta er eitt ógvuliga stórt og torskilt mál, bæði politiskt og løgfrøðisliga, sigur løgmaður.

Anfinn Kallsberg ásannar, at nógv er, sum enn ikki er fingið upp á pláss í hesum máli. Tí heldur hann, at vit mugu lata sjálvstýrisspurningin taka ta tíð, hann tekur.

– Tað hevði verið meira ørkymlandi fyri Føroya fólk, um vit meldaðu eitt út í dag og annað í morgin. Tað er tað, sum vit royna at sleppa undan við at siga, at vit nágreiniliga skulu siga fólkinum, hvat ætlanin heilt snýr seg um, tá vit eru lidnir við hana, sigur Anfinn Kallsberg, løgmaður.

### Óverulig ætlan

Føroya fólk er kortini ørkymlað, og tolið er við at ganga undan hjá andstøðuflokkunum. Teir vita ikki, hvat ætlanin í veruleikanum snýr seg um, og heldur ikki hava teir fingið at vita, hvussu nógvan pening, teir fáa játtaðan til at kunna fólkið undan fólkaatkvøðuni, og um nøkur tíð verður til tess. Landsstýrið ætlar nevniliga framvegis at halda fólkaatkvøðu í apríl, og 25. apríl hevur verið nevndur, sum tann stóri dagurin.

Hóast andstøðan kallar ætlanina óveruliga, heldur løgmaður, at vit enn skulu hava gott mót.

– Lat okkum nú síggja, um tað verður órealistiskt at halda fólkaatkvøðuna í apríl. Hetta er enn málsetningurin hjá landsstýrinum. Tað kunnu vera so nógv ting, sum spæla inn á vegnum, sigur Anfinn Kallsberg, løgmaður.

# Góvu byggiloyvi til nýtt kryvjivirki



**Á býráðsfundi í Klaksvík týskvøldið samtykti býráðið at lata prinsipielt byggiloyvi til nýtt krivjivirki**

KLAKSVÍK
*y un akst in*

Feløgini Faroe Salmon og East Salmon ætla at byggja nýtt stórt kryvjivirkið á vestara kaiøkið í Klaksvík.

Kryvjivirkið skal betra um umstøðurnar at slakta laksin, sum feløgini ala í Norðoyggjum, og virkið verður heilar 2100 fermetrar stórt.

Málið var til viðgerðar á býráðsfundi í Klaksvík týskvøldið, og býráðið samtykti, at prinsipielt byggilovyi verður latið til at byggja virkið.

Tað er við at gerast trongligt á vestara havnaøki í Klaksvík, og býráðið hevur tí kravt, at nýggja kryvjivirkið verður bygt 10 metrar longri suðuri, enn ætlanin upprunaliga var.

Feløgini, sum skulu byggja virkið, eru eisini spurd, um tey kunnu byggja minni virkið, men tað kunna tey ikki. Tí verður virkið í upprunaligu støddini, men teinurin frá Roykivirkinum og til nýggja virkið verður styttri enn ætlanin var.

# Til morgunmatar saman við amerikanska forsetanum

**Føroyingar hava fyrr verið til morgunbønarhald saman við amerikanska forsetanum og Olaf Olsen, sum saman við konuni fer til Washington í morgin hevur verið tríggjar ferðir áður á slíkum bønarhaldi. Men hann kemur tó ikki at hitta forsetan persónliga. Forsetin er saman við 4000 øðrum til hetta bønarhald og tað eru bara statsleiðarar, sum hitta forsetan persónliga.**

BØNARHALD
*stinus ivsson*
*i sgaar*

Í næstum hittast 4000 fólk í Washington til eitt bønarhald og aftaná verður morgunmatur. Høvuðsgesturin á hesum børnamøti er amerikanski forsetin Georg Bush yngri. Og fýra føroyingar luttaka eisini á hesum bønarhaldi. Teir eru Olaf Olsen og frú og Jákup Jacobsen.

– Stutt eftir seinna heimsbardaga tóku amerikanskir senatorar og kongresslimir seg saman og fóru at skipa fyri bønarhaldi. Teir hittust einaferð um mánaðin og hava hildið hendan sið síðan. Nakað seinni fóru teir eisini at bjóða øðrum við og síðan er hetta tiltak ment, soleiðis at tað í dag er víða um. Síðurin er tikin upp aðrastaðni, fyrst í USA og síðan í øðrum londum og nú koma menn, sum hava ávirkan í lokalsamfelagnum, saman í mongum londum til slíkar bønarfundir einaferð um mánaðin. Í 1953 var amerikanski forsetin Eisenhower boðin og síðan hevur forsetin luttikið á hvørjum ári, undantikið eitt, tá sitandi forsetin var sjúkur. sigur Olaf Olsen, reiðari.

– Tað einasta sum krevst til hesar fundir er, at luttakararnir koma saman í navni Jesu Kristst og at teir hava ávirkan á tað samfelag teir liva í, sigur Olaf Olsen.

### Sundstein hitti forsetan.

Meðan Jógvan Sundstein var løgmaður, luttók hann á einum slíkum bønarmøti í Washington og tá hitti hann forsetan. Olaf Olsen hevur verið tríggjar ferðir á hesun morgunfundi. Hann hevur verið í sama rúmi sum pápi nýggja forsetan, Georg Bush, tvær reisur saman við Clinton og nú saman við Bush, yngra.

Olaf sigur, at fyrrverandi amerikanski varaforsetin James Baker var høvuðstalari einaferð og hesuferð var ætlanin, at Billy Graham skuldi vera høvuðstalari. Men hann er gamal og veikur nú og hann hevur heilsað og givið avboð.


